# Ásetingin um ognarpening er ikki nóg neyv

*Fiskimálastýrið ynskir, at tað veruliga eru føroysk áhugamál, sum standa aftan fyri íløgur í fiskifør*

Ólavur í Beiti

Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, hevur nú lagt uppskot fram um vinnuligan fiskiskap, og sigur m.a. í viðmerkingunum til uppskotið, at løgtingið samtykti at herða ásetingarnar um loyvda luttøku hjá útlendskum áhugamálum at vera við í føroyskum fiskiskipum. Ásett varð, at nú skuldu 2/3 av eigararunum lúka oman fyri nevndu treytir ímóti helvtin frammanundan. Harumframt varð ásett, at eigararnir av 2/3 av ognarpeninginum eisini skulu lúka somu treytir um tilknýti til Føroyar.

– Treytirnar um eigaraviðurskifti vórðu aftur broyttar við, tá ásett verður, at teir føroysku eigararnir av ognarpeninginum eisini skulu hava 2/3 av atkvøðurættinum í felagnum.

### Grannskoðarakanning

– Í teimum málum, sum Fiskimálastýrið hevur viðgjørt, har talan hevur verið um, at útlendsk áhugamál hava verið uppií, er komið fram, at ásetingin um ognarpening er ikki nóg neyv, tí hetta fevnir ikki um ábyrgdarpening.

– Harumframt kunnu avgerðir verða tiknar, hóast treytirnar um sjálvan atkvøðurættin í felagnum verða loknar sambært lógini. Tí verður skotið upp, at orðið »ognarpeningur« verður strikað. Í staðin verður ásett, at eigararnir av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum, herundir partapeninginum umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skulu lúka treytirnar í stk. 2.

– Fiskimálastýrið ynskir, at tað veruliga eru føroysk áhugamál, sum standa aftan fyri íløgur í fiskifør. Í tí sambandi verður skotið upp, at treytir kunnu verða settar um íløguførleika hjá teimum einstøku eigararunum aftanfyri ætlanirnar. Til tess at greina hetta nærri kann Fiskimálastýrið biðja um grannskoðarakanningar av eigararunum hvør sær, til tess at staðfesta teirra íløguførleika sammett við teirra lutfalsliga part av íløguni, sigur Jørgen Niclasen m. a. í viðmerkingunum

### Lógarbrot

Viðvíkjandi spurninginum um lógarbrot, sigur Jørgen Niclasen, at Fiskimálastýrið metir, at um fiskifarið verður dømt fyri lógarbrot, skal fiskifarið eisini kunna verða dømt at endurrinda fiskiveiðueftirlitinum á sjónum fyri tær útreiðslur, sum kanningarnar í havn kostaðu eftirlitinum.

– Í hesum sambandi skal tó verða lagt afturat, at hesar útreiðslur hóskandi áttu at verið roknaðar upp í upphæddina, tá virði á veiðunøgd verður inndrigið í slíkum førum. Men til tess at tryggja lógargrundarlag fyri hesum, verður skotið upp, at hetta er beinleiðis ásett í lógini, sigur fiskimálaráðharrin m. a. í sínum viðmerkingum til uppskotið.

# Leiðslupyramidan er á veg innaftur

Stigveldi er á veg innaftur á arbeiðspláss í Danmark, aftan á fleiri ár, har tað var mett at verða best við flatum leiðslubygnaði, miðspjaðing og leiðslubólkum.

Ein nýggj kanning sum er gjørd í samstarvið millum Handilsháskúlan í Århuus og Ledernes Hovedorganisation vísir, at serlig innan ta privatu vinnuna eru fleiri leiðslulið á virkunum. Ársøkin til hettar er helst, at royndir við fløtum leiðlsubygnaði og sjálvstýrandi arbeiðsbólkum, ikki hevur givið tey ynsktu úrslitini allastaðni - og serliga ikki á framleiðsluvirkjum.

Á fleiri virkjum hevur verið trupult at fingið starvsfólkini at taka arbeiðsábyrgd, og tá so er, kann hugtakið við tí flata leiðslubygnaðinum ikki brúkast.

# Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu greiða alt

*Ein av týdningarmiklastu orsøkinum til, at so fá fólk hætta sær undir at stovna egið virki í Danmark og øðrum ES-londum er, at nógvar lógir og reglur leggja haft um hugin og fyritakssemið, skrivar Vinnuhúsið*

Ólavur í Beiti

– Tvey lógaruppskot, sum eru løgd fram av Javnaðarflokkinum, kunnu — um tey verða samtykt — merkja, at føroyski arbeiðsmarknaðurin fer at broytast. Um uppskotini verða sædd sum partur av einari størri heild, har danskar og ES-arbeiðsmarknaðar lógir fara at mynda okkara arbeiðsmarkna, verður úrslitið, at vit fáa ein líka stirvnan arbeiðsmarkna sum fleiri av ES-londunum, skrivar Vinnuhúsið.

– Fyri nøkrum vikum síðani legði Javnaðarflokkurin lógaruppskot fyri tingið um »skyldu arbeiðsgevaranna at boða løntakarum frá um setanartreytir teirra«. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt vinnunevndini greitt, at felagið einki hevur ímóti, at seturnarviðurskiftir koma undir skipaðar karmar, men eftir okkara tykki er hetta nakað, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at greiða sínamillum. Eisini hevur felagið víst á, at føroyskir lógarkarmar eiga at vera hóskandi fyri okkara arbeiðsmarkna, og ikki eitthvørt avskrivað ES direktiv.

– Nú er so eitt annað lógaruppskot lagt fram, ið setur reglur fyri hópuppsagnum. Talan er eisini um eina danska lóg, grundað á eitt ES-direktiv. Eisini í hesum føri heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at talan er um viðurskifti, ið náttúrliga hoyra heima í avtalum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

### Pappírsarbeiði

– Javnan hoyra vit politikarar tosa um tørvin á arbeiðsplássum og nýggjum møguleikum úti um landið. Men somu politikarar geva kanska ikki gætur, at ein av týdningarmiklastu orsøkinum til, at so fá fólk hætta sær undir at stovna egi virki í Danmark og øðrum ES-londum er, at nógvar lógir og reglur leggja haft um hugin og fyritakssemið.

– Í dag hava nógv smærri virkir her á landi ongan til burturav at orðna pappírsarbeiðið. Um vit høvdu allar tær arbeiðsmarknaðarlógir, ið eru í Danmark, bar slíkt ikki til. Prísurin fyri ein arbeiðsmarkna, ið er neyvt stýrdur við lógum er, at gongdin verður móti fleiri størri virkjum ella eini miðsavnan. Tey smáu virkini hava snøgt sagt ilt við at klára tær umsitingarligu byrðarnar og tær fíggjarligu bindingarnar, ið fylgja við umrøddu lógarstýring.

– Tí hongur tað ikki saman, um politikarar okkara bæði tosað um at spjaða arbeiðspláss um landið og samstundis seta umsitingarligar fótonglar fyri fólk, ið vilja stovna egið virkið.

Og at enda verður sagt í tíðindaskrivinum, at undir kreppuni mitt í 90'unum, tá alt lá stilt, royndu fleiri ágrýtnir menn at stovna nýggj fiskavirkir, hóast útlitini vóru alt annað enn góð. Um ein lóg um hópuppsaginir var galdandi tá, samsvarandi tí uppskoti, ið er lagt fram, vildi kanska onkur teirra setst aftur við ætlanum sínum. Lógin merkir, at hesir menn kundu rokna við at koma at gjalda løn til arbeiðsfólki væl longri enn upsagnartíðirnar í sáttmálanum siga, um virkið ikki gekk.

# Brúk er fyri hoyring í vinnuni



Ólavur í Beiti

*Til tess at skapa betri samljóð millum vinnuna og landsstýrismannin í fiskivinnumálum hevur Jørgen Niclasen lagt uppskot fram um nýtt fiskivinnuráð*

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Jørgen Niclasen, fiskivinnumálaráðharri m. a. at í uppskotinum um fiskivinnuráð verða uppgávurnar undir teirri fyrru skipanini við fiskivinnuráði og Fiskivinnu Starvsnevnd lagdar saman, og eitt minni ráð verður skipað til at røkja tær uppgávur, sum í dag eiga at verða viðgjørdar í fiskivinnuráðnum.

– Eftir núgaldandi lóg skal landsstýrismaðurin leggja allar umfatandi fiskivinnuspurningar fyri fiskivinnuráðið til ummælis. Fiskivinnuráðið kann av sínum eintingum taka fiskivinnumál til viðgerðar og geva landsstýrismanninum tilmæli. Fiskivinnuráðið sendir í minsta lagi eina ferð um árið landsstýrinum frágreiðing og tilmæli, men skipanin hevur ikki virkað væl, og trupult hevur gingist at fáa valt nýtt fiskivinnuráð eftir nýtt løgtingsval, sum ásett er í lógini.

– Eisini hava einstøk feløg sýtt fyri at tilmæla umboð í fiskivinnuráðið. Nýtt fiskivinnuráð er tí heldur ikki tilnevnt í dag, sigur Jørgen Niclasen.

### Samfelagsligan týdning

Sambært viðmerkingunum, so er Fiskivinnu Starvsnevndin millumlið millum landsstýrismannin og fiskivinnuráðið. Landsstýrismaðurin leggur uppskot til lógir, kunngerðir og reglugerðir, sum hava við fiskivinnuna at gera, fyri Fiskivinnu Starvsnevndina til ummælis. Fiskivinnu Starvsnevndin hevur virkað eftir galdandi skipan. Sambært galdandi lóg verða eftir hvørt løgtingsval eftir tilmæli frá vinnuni 16 mans tilnevndir sum limir í Fiskivinnu Starvsnevndini.

Sambært nýggja uppskotinum verður eitt minni ráð skipað til at røkja tær uppgávur, sum í dag eiga at verða viðgjørdar í fiskivinnuráðnum. Tað er meting landsstýrismansins, at brúk er fyri hoyring í vinnuni, sum eisini á henda hátt kann seta síni sjónarmið fram.

– Haraftrat hevur fiskivinnan so stóran samfelagsligan týdning fyri Føroyar, og spurningurin verður eisini settur, um tað vanta virknir felagskapir, sum arbeiða við samfelagsligum spurningum í fiskivinnuni, sum t.d. brúkaraspurningum, náttúruvernd v.m. Tað verður eisini uppgávan hjá fiskivinnuráðnum at viðgera tílík mál, sigur Jørgen Niclasen.

# Dagtilhaldið Lugarið í Leirvík

*Mánadagin 6. mars tóku leirvíksingar nýístandgjørt høli í nýtslu til dagtilhald*

LUGARIÐ, sum teir hava valt at kalla tað, liggur væl fyri mitt í bygdini við góðum útsýni til fiskaríhavnina, og tað sum har gongur fyri seg. Hølið hevur fyrr verið nýtt sum kiosk, tað er ikki stórt, men hugnaligt, hóast enn vantar nakrar myndir á vegginum.

Á lítlari samkomu sum leygardagin var fyri teim sum stuðla hava tiltakið vi peningi og sjálvbodnum arbeiði, hugleiddi Osmund Justinussen, sum jú hevur sínar røtur í Leirvík, um tað fjøltáttaða umhvørvi sum eitt lugar var, ella rættari hevði verið.

Tað at hava verið uppihaldsrúm, sovirúm, køkur, skaffirúm, fundarrúm, møtisalur, skrivi- og lesirúm, o.a. var tað eyðsæð at eitt slíkt rúm rúmdi nógvum upplivingum og nógvum ymiskum frásagnum. Her vóru bæði tey lokalu og verðinsmálini greidd út í æsir.

Hann ynskti stigtakarunum eydnu við tiltakinum og ynskti góða undirtøku.

Bygdarráðsformaðurin Sjúrður Eliasen hugleiddi um hølini, sum nú varð sitið í. Upprunaliga bygd til ísgoymslu í 40'unum, – tí eisini kalla íshúsið, tó at ísur ongantíð varð gjørdur har, men borin í leypi tá kavi var. Eina drúgva tíð var nógv fiskaarbeiði har við fiskarúgvum langt út á vegin. Seinri sum egningarhøli fyri teir størru útróðrarbátarnar fyri so at enda sum kiosk og nú dagtilhald.

Mangt var at minnast aftur á, og ymiskar vóru søgurnar, sum longu hesa løtuna vóru havdar á lofti.

Lugarið fer tað fyrstu tíðina at hava opið frá kl. 10 til 12 og frá kl. 14 til 18, inntil funnið er útav hvørjar best egnaðu tíðirnar eru og hvussu tørvurin fer at laga seg.

Hølið er ætlað pensionistum og fólki, sum eru komin nakað til árs, at stytta teimum stundir.

Eit tlítið køksskapilsi er, so møguleiki er eisini at gera sær ein kaffimunn.

Vit ynskja lorvíksingum tillukku og eydnu við tiltakinum.



# MBF fingið nýggjan buss

*Seflutningstænastan fyri brekað í Havnini hevur úr at gera, og nú var gamli bussurin somikið slitin, at neyðugt var at skifta hendan út. Nýggi bussurin varð tikin í nýtslu fríggjadagin*

Jákup Mørk

Síðani fyrsti bussurin til serflutningstænastan kom til landið í 1984, er hetta ein tænasta, sum hevur vundið nógv upp á seg, og sum hevur verið til stóra gleði fyri rørslutarnað í høvuðsstaðnum.

### Staðin fyri løgmansveitsluna

Byrjanin til hesa tænastu hjá MBF er ein lítil søga í sær sjálvum, greiddi Súsanna Nolsøe frá. Í gomlum døgum var vanligt, at løgmansveitsla var á hvørjum ári, men í 1981, sum var ár teirra brekaðu, gjørdi táverandi løgmaður, Pauli Ellefsen, av, at eingin veitsla skuldi verða.

Ístaðin varð peningurin latin til MBM at nýta í til ymisk tiltøk hetta árið. Harumframt vórðu fleiri peningagávur latnar felagsskapinum hett árið, og tá avtornaði, hevði MBM fingið inn 75.000 kr. meira, enn tey høvdu latið út úr kassanum.

Hesin peningurin varð síðani nýttur sum partur hjá MBF til keyp av bussi, meðan restin varð goldin av Føroya Landsstýri og Tórshavnar Býráð við 100.000 hvør.

Bussurin kom so til landið í 1984, og síðani hevur tænastan verið virkin. Seinni hevur Klaksvíkar Kommuna eisini sett á stovn líknandi tænastu, og sum skilst, eru eisini aðrar kommunur, sum arbeiða við at seta á stovn slíka tænastu.

### Betri umstøður

Hesin bussurin tænti so sínum endamáli í drúgt áramál, men fyri nøkrum árum síðani, var hann somikið nógv slitin, at neyðugt var við nýggjum bussi.

Hetta var tó mitt í ringastu krepputíðum, og tískil gjørdist talan bert um eina fyribils loysn, tá ein brúktur danskur bussur varð keyptur, sum kundi røkja uppgávuna.

Nú er hesin so aftur skiftur út, og sigast má av sonnum, at talan nú er um eina munandi betran av umstøðunum.

Fyrst og fremst er nýggi bussurin, sum er ein vælvaksin Mercedes Benz, nógv rúmligari enn gamli bussurin. Hetta í sær sjálvum ger, at tað nú er møguleiki at hava fleiri ferðafólk við. Í gamla bussinum bar til at kroysta tríggjar koyristólar saman, men í hesum er væl rúm fyri fimm koyristólum, umframt at hjálparfólk teirra eisini fáa sitið í bussinum.

Harumframt er hesin bussurin somikið høgur innan, at gjørligt er at standa upprættur innan, og hetta léttir sjálvsagt munandi um arbeiðia hjá teimum, sum koyra í bussinum.

Í gamla bussinum gramdu fólk seg eisini ofta um, at tað gjørdist ov kalt inni, tá hurðin varð latin upp og aftur, men hesum er eisini tikin hædd fyri í nýggja bussinum. Ein hitablásari syrgir fyri, at luftin inni í bussinum alla tíðina er passaliga heit, og er hetta serliga nakað, sum tey eldru ferðafólkini eru fegin um.



*Sum tað sæst á myndini, so fær Doris Hansen, formaður í MBF, uttan trupulleikar staðið upprætt í bussinum. Hetta er ein av fleiri fyrimunin við nýggja bussinum*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Ferðaleiðarar ferðaðust

*Í samwbandi við altjóða ferðaleiðaradagin, 21. februar, skipaði Ferðaleiðarafelagið fyri tiltøkum*

At altjóða ferðaleiðaradagur var í farna mánaði, merktist sjálvandi eisini hjá føroysku leiðarunum. Fyri at markera dagin, høvdu tey skipað fyri nøkrum túrum, har ávíkavist kvøldskúlanæmingar og pensionistar vóru boðin við, soleiðis at tey kundu royna nakað av tí, sum ferðaleiðarar her heima skipa fyri.

### Í Tinganesi

Ein túrur varð gjørdur eftir íslendingaslóðum í gomlu Havnini og á Tinganesi. Tey luttakandi vóru næmingar, sum í løtuni ganga til íslendskt á kvøldskúlanum. Byrjað varð við minnismerkið eftir Niels R. Finsen. Men nyttar tað nakað hjá fólki, sum kenna Havnina væl og virðiliga, at fara túr eftir so heimkunningum gøtum?

At tey luttakandi vóru væl nøgd við túrin, er lítið at ivast í. - Hetta var ein stak hugnaligur túrur og søgurnar góvu knappliga vælkendum gøtum og húsum nýtt lív, helt onkur fyri, og fleiri vóru eisini tey, sum tóku undir við hesum.

Onkur annar helt nakað soleiðis fyri: - Rundferðin var sera áhugaverd. Eg havi altíð havt áhuga fyri gomlu Havnini, men allíkavæl vóru nógv støð og frásagnir, sum eg einki visti um. Íslendingin Karl Einarsson - Karl Dunganon - og hansara skemtibrøgd hevði eg til dømis ongantíð hoyrt um fyrr.

- Ja, tað var skemtiligt at hoyra ymiskar søgur, sum knýta seg til húsini úti í Havn, t.d. sethúsini hjá Handilsforvaltaranum, sum eisini hava verið fongsul í sínari tíð, og tað var heppið, at vit høvdu fingið avtalu um at sleppa inn at síggja nøkur av fundarhølunum í landsstýrinum.

- Eg hevði verið rundferð í gomlu Havnini við ferðaleiðara áður, og helt at hetta fór bara at vera endurtøka, men hesaferð vóru frásagnirnar ikki tær somu og frambornar á ein heilt øðrvísi hátt. Eisini var tað eitt upplivilsi at síggja tey nýrestaureraðu hølini í Skansapakkhúsinum.

Ferðaleiðarar í Tinganesi vóru Jóhanna Traustadóttir og Bette Johansen.

### Í SvF at gekkast

Sama dag høvdu pensionistar í Kollafirði fingið innbjóðing at vitja í Sjónvarpinum og í Norðurlandahúsinum í Havn saman við ferðaleiðarum úr Kollafirði, og høvdu 25 teknað seg til túrin.

Í Sjónvarpinum tók Ivan Niclasen ímóti teimum og vísti teimum runt í húsinum. Serliga áhugavert hjá teimum eldri var at vera í Gekkastudionum og sleppa at mala hjólinum. Tey fingu eisini nógv av vita um sjónvarpið og um, hvussu umstøðurnar eru hjá teimum at arbeiða.

Aftaná varð farið niðan í Norðurlandahúsið til ein drekkamunn. Úr Norðurlandahúsinum varð farið ein túr við bussinum út á Hamaran á Argjum, haðani útsýnið yvir Havnina var sera vakurt henda kalda, men klára vetrardagin. Áðrenn koyrt varð norðuraftur, varð eisini farið ein túr gjøgnum nýggju býlingarnar omanfyri Havnina, so at fólkini kundu fáa eina mynd av, hvussu Havnin veksur.

- Vit vóru heppin, at ferðaleiðararnir bjóðaðu okkum henda túrin. Um veturin hugsar man minst um at fara útferð, men vit fingu ein frálíkan túr burturúr, segði ein av luttakarunum aftaná. Øll vóru sera glað fyri at hava verið við, og ferðaleiðararnir, Gunnvá Dam og Ólavur Hansen, lata heilsa og takka Kollafjarðar kommunu fyri, at tey vildu gjalda fyri bussin og drekkamunnin í Norðurlandahúsinum.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL — Sýnaður 04-98
Skrás.: 02-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 218.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,6 H/B GINZA — Sýnaður 04-96
Skrás.: 30-04-96
Km.: 34.000
Prísur: 112.600,- Garanti*

TOYOTA CAMRY 2,2 XL — Sýnaður 10-98
Skrás.: 21-12-91
Km.: 80.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 Xli H/B — Sýnaður 10-96
Skrás.: 31-10-96
Km.: 35.000
Prísur: 108.600,- Garanti*

Sosialurin - 311820

TOYOTA AVENSIS 2,0 SOLPLUS — Sýnaður 12-98
Skrás.: 23-12-98
Km.: 15.000
Prísur: 208.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 Xli H/B — Sýnaður 02-00
Skrás.: 10-05-90
Km.: 105.000
Prísur: 52.600,-

TOYOTA CARINA 1,8 Gli — Sýnaður 03-96
Skrás.: 26-03-96
Km.: 58.000
Prísur: 129.600,- Garanti*

TOYOTA HIACE 10 PERS. BUSSUR — Sýnaður 10-99
Skrás.: 16-06-95
Km.: 160.000
Prísur:138.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 STATION — Sýnaður 02-99
Skrás.: 18-06-90
Km.: 59.000
Prísur: 59.600,-

FIAT PUNTO 60 S — Sýnaður 01-97
Skrás.: 30-01-97
Km.: 42.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 GL — Sýnaður 10-98
Skrás.: 01-11-89
Km.: 154.000
Prísur: 49.600,-

FORD FIESTA 1,3 — Sýnaður 04-96
Skrás.: 29-04-96
Km.: 104.000
Prísur: 66.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN — Sýnaður 02-96
Skrás.: 12-02-96
Km.: 16.000
Prísur: 97.600,- Garanti*

NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR — Sýnaður 12-99
Skrás.: 15-12-87
Km.: 135.000
Prísur: 69.600,-

AVHEINTINGARTILBOÐ

TOYOTA CAMRY 2,0 Xli AUTOM.
Skrás.: 22-10-87
Km.: 205.000
Prísur: 15.000,-

MITSUBISHI GALANT T DIESEL — SKAL SÝNAST!
Skrás.: 25-08-89
Km.: 287.000
Prísur: 15.000,-

HONDA CIVIC 1,5 — Sýnaður 12-98
Skrás.: 01-06-86
Km.: 175.000
Prísur: 12.000,-

TOYOTA CAMRY 1,8 XL — Sýnaður 11-97
Skrás.: 28-01-87
Km.: 197.000
Prísur: 10.000,-

VØRUVOGNUR

MITSUBISHI PAJERO VAN — Sýnaður 06-99
Skrás.: 05-10-95
Km.: 85.000
Prísur: 138.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

Støkkið inn á gólvið!

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00





Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040